# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

*- Vit hava jú triðja-málverjan hjá okkum, Tolga Zengin, so kanska verði eg noyddur at brúka hann sum útispælara*
*Fatih Terim, turkiskur landsliðsvenjari*

# Turkar í ringum skørum

**UEFA noktaði at geva undantaksloyvi at kalla fleiri spælarar til hópin, og venjarin hevur skemtandi tikið til, at hann helst noyðist at brúka eykamálverjan sum útispælara**



*Í gjár stóð endaliga greitt, at tað ikki eydnaðist turkiska liðskiparanum, Emre Belozoglu, at verða klárur til hálvfinaluna móti Týsklandi*
*Mynd: Polfoto/AP*

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Fyrstimálverjin, Volkan Demirel, er leikbannaður. Tað sama er verjuspælarin Emre Asik eins og miðvallararnir báðir Arda Turan og Tuncay Sanli.

Hartil hava skaðar í hópatali rakt turkiska hópin. Í gjárkvøldið stóð greitt, at liðskiparin, Emre Belozoglu, ikki verður tøkur, og eisini eru vandamikli Nihat Kahveci, sterki Emre Gungor og verjuspælarin Servet Cetin úti við skaða. Hinvegin verður roknað við, at hálvskaddi Tumer Metin verður í hópinum, men tað er neyvan hugsingur um, at miðvallarin er førur fyri at spæla meira enn hálvan tíma.

Soleiðis eru fortreytirnar hjá turkiska landsliðsvenjaranum, Fatih Terim, nú hann fyrireikar turkiska landsliðið til hálvfinaluna móti Týsklandi í kvøld.

- Vit hava jú triðja-málverjan hjá okkum, Tolga Zengin, so kanska verði eg noyddur at brúka hann sum útispælara, segði Terim hálvgum skemtandi fyrr í vikuni. Men tó at orðini vórðu søgd í skemti, so vórðu tey tikin í álvara av onkrum av turkisku miðlunum.

### Bert eftir bólkaspælið

UEFA hevur á tveimum fundum viðgjørt turkisku bønina um at fáa undantaksloyvi, soleiðis at landið kann kalla eyka spælarar inn til hópin, nú vandi er fyri, at dómaraseðilin bert fer at telja 14 spælarar til hálvfinaluna. Men í báðum førum hevur svarið verið noktandi.

- Meginreglan er, at tað er bert eftir bólkaspælið, at lond kunnu kalla eyka spælarar inn til hópin. Og hetta er ein regla, ið vit ikki eru sinnaðir at víkja frá, eru boðini, sum turkar hava fingið frá UEFA.

Og so er øsingin sjálvandi stór í Turkalandi. Fram til 1996 var als ikki loyvt at kalla eyka spælarar inn til hópin, tá endaspæli fyrst var blást ígongd. Í 1996 fekk júst Týskland tó fleiri skaðar longu í bólkaspælinum, og tá vildi UEFA víkja frá táverandi meginregluni, soleiðis at týskarar kundu styrkja sær um hópin undan knock-out partinum av endaspælinum. Eitt endaspæl, sum eisini endaði við, at júst Týskland gjørdist evropameistari. Og tí halda turkar, at øll eru ikki líka fyri lógini. Og at summi í øllum førum eru meira líka enn onnur.

## Eystanstevnuróðurin

Róðrarsambandið hevur boðað frá, hvussu startrøðin verður til FM-róðurin á eystanstevnu. Barnaróðrarnir byrja klokkan 13.30, og klokkan 15 verður so farið undir sjálvan FM-róðurin. Startrøðin til róðrarnar er hendan:

**Barnaróður, dreingir**
5 Ørnin
6 Blikur
7 Títlimgur
8 Jallurin
9 Teistin
10 Spógvin
11 Havfrúgvin
12 Frúgvin
13 Junkarin

**Barnaróður, gentur**
3 Spógvin
4 Junkarin
5 Blikur
6 Hvassi
7 Kollur
8 Frúgvin
9 Ørnin
10 Teistin
11 Títlingur
12 Tjaldrið
13 Tambar
14 Falkur

**5-mannafør, gentur**
6 Blikur (G)
7 Junkarin
8 Hvassi
9 Drekin
10 Jallurin
11 Firvaldur
12 Tambar

**6-mannafør, kvinnur**
8 Gongurólvur
9 Jarnbardur
10 Lómur (G)

**5-mannafør kvinnur**
5 Blikur (G)
6 Ritan
7 Katla
8 Frúgvin
9 Sílið
10 Erla Kongsdóttir
11 Báran
12 Havfrúgvin

**5-mannafør, dreingir**
5 Jallurin
6 Katla
7 Strípan
8 Havfrúgvin
9 Sílið
10 Junkarin
11 Tjaldrið
12 Teistin
13 Blikur

**6-mannafør menn**
4 Hósvíkingur
5 Víkingur
6 Lómur
7 Gongurólvur
8 Tvøråbáturin
9 Sundabáturin
10 Riddarin
11 Fortuna
12 Rádni
13 Jarnbardur

**8-mannafør**
7 Kvívíkingur
8 Árnfirðingur
9 Heiðabáturin
10 Argjabáturin

**10-mannafør**
7 Nólsoyingur
8 Havnarbáturin
9 Ormurin

# Nú vil Skála hava sigurin

**Styrkislutfallið millum Skála og HB tykist ikki vera tað sama í dag, sum tað var í fyrsta umfarinum av landskappingini**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Ta ferðina vann HB ein knúsandi 8-1 sigur, og so varð lagt upp til, at fólk tosaðu um HB sum heitasta FM-favorittin, meðan Skála varavgjørdi dumpikandidaturin.

FM-heitið tosað tey ikki so hart um longur í HB, nú EB/Streymur longu tykist hava gjørt bart í landskappingini. Og hóast Skála enn er undir niðurflytingarstrikuni, so hava bæði spæl og úrslit verið á heilt góðari leið seinastu tíðina.

Fyri tað nógva hevur talan tó verið um javnleikir, og tí vilja tey á Skála nú hava nakrar sigrar, soleiðis at eitt veruligt lop kann gerast á talvuni. Skal hetta eydnast, so er tó neyðugt at hvessa álopið, sum als ikki hevur skorað seinastu fýra dystirnar. Hinvegin hevur verjan staðið seg væl, og er bara eitt mál farið ígjøgnum í somu dystum.

Til dystin hesaferð hevur Skála á leið sama fólk tókt, sum teir høvdu til seinastu uppgávuna. Tó er Poul N. Poulsen leikbannaður, meðan Alexandur Johansen framvegis ikki er komin fyri seg eftir skaða.

Hjá HB er Fróði Benjaminsen framvegis ikki tøkur, tí reyða kortið á Sandi gav tveir dystir í leikbanni við sær. Hartil fekk Ólavur í Ólavstovu heilaskjálvta í Intertoto-dystinum móti Elfsborg, meðan Milan Kuljic er ivasamur til dystin.